## Evangelist meldað til løgregluna

Felagsskapurin Børns Vilkår hevur nú meldað fríkirkjuna Evangelist til løgregluna fyri at hava framt likamligan ágang íóti einum 11 ára gomlum drongi í fjør. Sambært felagsskapinum var drongurin farin í fríkirkjuna at lurta eftir bíbliusøgum. Seinni greiddi hann frá, at frá trimum vaksnum monnum fekk hann at vita, at hann hevði illar andar í sær, og at teir skuldu rekast út. Menninir hildu dronginum, meðan teir talaðu í tungum og róptu í andlitið á honum. Eitt korter seinni slapp drongurin leysur. Bente Boserup, sum er ráðgevingarleiðari hjá Børns Vilkår, sigur við DR, at eftir teirra tykki er talan um álvarssaman ágang. Evangelist hevur umleið 1.000 limir í Danmark.



## Meiriluti fyri umsókn

Íslendska mstjórnin kann eftir øllum at døma kenna seg rættiliga vísa í, at ein meiriluti av altingslimunum fara at takvøða fyri uppskotinum frá stjórnini um at fara undir limasamráðingar við ES. Fimm av tinglimunum hjá Vinstrafylkingini hava boðað frá, at teir fara at atkvøða ímóti. Stjórnmálafrøðingurin Einar Mar Þórðarsson sigur við Vísir, at halda Framsóknarflokkurin og Borgarafylkingin tað, sum flokkarnir søgdu undir valstríðnum, so fara teir at styðja uppskotið hjá stjórnini um samráðingar við ES. Og tað er meiri enn nóg mikið til at tryggja uppskotinum meiriluta, sigur hann.

# Gjørdu seg inn á dagstovn

**Ótangar høvdu sunnunáttina verið á vitjan við Dagstovnin við Kráir í Hvalvík. Her hava teir framt herverk og brotið fleiri rútar**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*Myndir: Rógvi Nybo*

Sunnumorgun, stutt fyri døgurða, fekk leiðarin á Dagstovninum við Kráir ein ordans hvøkk. Hon varð tá uppringd av starvsfólki í dagstovninum, ið kundi greiða henni frá, at onkur hevði brotið sær veg inn í dagstovnin.

Tað vísir seg sum at ótangar hava verið á vitjan um náttina, og at teir hava brotið fleiri rútar í tveimum hurðum og í smærri úthúsum, har børnini plaga at leika.

Løgregla úr Eysturoy og umboð fyri kommununa vórðu boðsend at meta um hvussu umfatandi skaðarnir vóru.

Eftir at hava kannað eftir inni í dagstovninum, metti løgreglan tó ikki at talan er um innbrot, men heldur um herverk.

Tá løgreglan var liðug við kanningararbeiðið, fóru fólk úr kommununi í gongd við uppruddingina og at seta fyri brotnu rútarnar, soleiðis at Dagstovnurin við Kráir kundi lata upp aftur í morgun. Av tí sama ávirkaði henda lat Dagstovnurin við Kráir upp aftur sum vanligt í morgun.





# Áh píka... dekkini

**Altjóða arbeiðaradagurin 1. mai er eisini dagurin, tá píkadekkini skulu vera komin undan bilinum. Sosialurin hevur kannað støðuna, spurt løgregluna hvat hendur, um tú verður tikin og hevur gloymt píkadekkini**

FERÐSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú er tíðin komin har asfaltdustið aftur leggur seg og píkarnir ikki longur verða skotnir í eyst og vest. Frá 1. mai var ikki longur loyvt at koyra við píkadekkum, og tað eru tað helst fleiri, ið fegnast um, hóast vit enn kunnu fáa eitt følv av kava.

Sosialurin hevur spurt, hvat hendur, um tú verður tikin, og hevur gloymt ella »gloymt« at skifta píkadekkini út.

- Tað, sum hendur er at tú fært eina bót á nakrar hundrað krónur. Men skiftir tú ikki dekkini kann tú fáa upp til fleiri bøtur, heilt inntil tú finnur útav at skifta dekkini út, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

Vakthavandi greiðir eisini frá, at løgreglan, tá komið er nakrar dagar inn í mai mánað, vanliga fer út at kanna støðuna við píkadekkum og øðrum í sokallaðum §13 kanningum, og at tað helst ikki verður nakað øðrvísi í ár.

### Bert einstakur undantøkkingur við píkum

Sosialurin var í gjár úti í høvuðsstaðnum og kannaði støðuna við píkadekkum. Vit kannaðu í alt 369 bilar, ið stóðu parkeraðir kring SMS og á Skálatrøð seinnapartin í gjár.

Niðurstøðan fær valla verið greiðari. Av teimum 369 bilunum, ið vit hugdu eftir, høvdu bert tríggir bilar enn píkadekk við píkum í undir bilinum. Av teimum trimum hevði eini bilurin staðið í longri tíð og hevur mist pláturnar, so hann kann valla teljast við.

Sostatt eru tað bert tveir av teimum 369 bilunum, ið enn stóðu á píkadekkum, svarandi til 0,54 prosent av bilunum. Hetta má sigast at vera sera lítið.

Havast skal tó í huga, at hetta er ein kvantitativ kanning, ið ikki neyðturviliga vísur støðuna um alt landið, men bert í høvuðsstaðnum henda seinnapartin.

*Føroyingar eru raskir at sleppa sær av við píkarnar. Bert tveir til tríggir av 369 kannaðum bilum hava enn til góðar at sleppa sær av við píkarnar*

*Modelmynd: Álvur Haraldsen*

